

*Ebba Muller var eitt konubrot. Hon var donsk og gjørdst tíðliga einkja. Hon gjørdist ein virdur formaður í reiðarafelagnum í 10 ár. Eiden Müller skrivar, at hann veit ikki øvugt orð vera fallið millum hana og teir, sum samráddust fyri fiskimannafelagið. Ebba var verdóttir Søren Müller, fyrsta formannin*



*Carl Mortensen, settur sýslumaður á Tvøroyri, var ein stovnari av reiðarafelagnum*



*Tað eydnaðist amtmanninum Rytter at fáa semju millum reiðarafelagið og fiskimannafelagið í eini spentari støðu í 1918. Hetta mundi vera hansara seinasta avrik í Føroyum. Beint aftaná legði hann frá sær sum amtmaður at mótmæla stuðlinum, sum danski forsætismálaráðharrin Zahle gav føroyskum sjálvstýrismonnum til fólkatingsvalið um hetta mundi. Zahle var pápabeiggi Ebbu Müller, sum gjørdist formaður í reiðarafelagnum*

eykapart til bestamenninar.

Hóast sáttmálin tyktist at vera hampiliga greiður, so vóru tó ásetingar, sum vóru ymiskt fataðar, og hetta skapti ónøgd millum fiskimenn.

Ein av hesum ásetingum var, at manningin skuldi bera sín triðjapart av "alle slags Udgifter til Anskaffelse af Agn og dets Opbevarelse om Bord." Henda orðing vísti seg at vera sera rúmsátt og varð ymiskt uppfatað. Summir reiðarar lótu hetta vera uppfylt við keyp av sild til agn og ísi at goyma hana í. Aðrir tóku umframt fyri ískassar, frystipannur, lóður, ja enntá fyri teir bátar, sum vóru nýttir til at skjóta ritu til agn.

Fiskimenn vóru í slíkum førum illa nøgdir við avrokningina. Tað nyttaði ikki nógv hjá hvørjum einstøkum at gera nakað við hetta. Hetta gav hugskotið til ein felagsskap fyri fiskimenn, sum kundi vera mótpartur til reiðarafelagið.

## Fiskimannafelag verður eisini stovnað

Tað var í desember 1910, at fiskimenn í Gøtu tóku fyrsta stigið til stovnan av einum fiskimannafelag. Tá sendu teir bræv út til fiskimenn í øllum bygdum í Føroyum við áheitan um at virka fyri einum slíkum felag.

Úrslitið av hesum brævi var, at síðst í februar 1911 høvdu 24 sóknir boðað frá, at tær høvdu valt sendimenn til at møta á felagsfundi í Havn 1. mars.

Henda dagin møttu 45 sendimenn í avhaldshúsinum í Havn. Á hesum fundi varð vald ein bráðfeingisnevnd, sum aftur helt fund tann 6. og 7. juni, og nú varð uppskot gjørt um eina felagslóg. Og á fjølmentum fundi í avhaldshúsinum tann 14. november 1911 varð felagið endaliga sett á stovn.

Fyrsti formaður gjørdist Símun Pauli úr Kunoy, sum var lærari í Gøtu, og sum hevði lagt gøtumonnum lag á, tá teir sendu brævið út.

Tann 12. januar 1912 kom stjórn felagsins saman til fundar fyri fyrstu ferð. Á hesum fundi varð Rasmus Rasmussen (á Háskúlanum) valdur til skrivara, eitt starv sum hann hevði fram til 1947. Á hesum fundi, sum vardi í 2 dagar, varð lagt grundarlag fyri tí samráðingarfundi, sum ætlaður var at vera við Reiðarafelagið tann 25. januar.

Um hesar samráðingar sigur Rasmus Rasmussen í 25 ára riti felagsins:

Samráðingin kom í lag, og reiðarafelagið setti eina nevnd til at samráðast við formann



*Her í gomlu sýslumanshúsunum í Gongini fóru samráðingarnar fram, meðan Ebba Müller var formaður*

fiskimannafelagsins um kontraktina fyri 1912. Til tann dag høvdu útgerðarmenninir í Føroyum einsamallir ásett kontraktini; nú kravdu fiskimenninir at koma við upp í leikin. Tað var nokk ikki frítt fyri, at summir av teimum eldru útgerðarmonnunum hildu hetta vera burtur av allari góðari leið. Ikki varð hildið nógv um, ar fiskimenninir høvdu sett ein lærara til álitismann teirra, ein mann, sum slætt ikki var fiskimaður ella sjómaður. Men hann var førur fyri at orðføra seg á ein sámuligan og so miðvísan hátt, at hann var ikki lættur at benda í orðadrátti. Teir flestu innanfyri reiðarafelagið sóu tó væl, at hetta mátti verða leiðin og lagið í framtíðini, og soleiðis komu samráðingarnar í lag á sakligari grund.

## Fyrsti lønarsáttmáli í Føroyum

Ikki var tilætlað at vinna fram í stórum stigum hjá F.F.; men tað vóru tó ávís punkt, sum felagsformaður fiskimannafelagsins setti sær fyri at fáa broytt. Tað ráddi fyri honum minni um hvussu stórar ella smáar broytingar í fyrstu atløgu vóru, bert tað kundi eydnast at vika tí gamla úr stað. Og í royndum vóru broytingarnar ikki stórar, men seinni tíðir hava prógvað, hvussu gott hegni S.P. úr Kunoy hevði til júst at seta meitilin á, har tað kom at muna í longdini.

Sáttmálin varð undirskrivaður í Havn 27. og 28. januar 1912. Fyri reiðarafelagið skrivaði formaðurin Søren E. Müller undir. Hetta er so vítt vit vita fyrsti lønarsáttmáli, sum er gjørdur í Føroyum millum feløg.

Tann mest umfatandi broytingin var í reglunum fyri frábýti. Hetta er reglan sum gevur fiskimonnum rætt til at ráða yvir sínum egna parti sum at selja hann til aðrar, sum kunnu geva hægri prís. Hesin rættur var staðfestur í sáttmálanum fyri 1908. Bert tað at reiðarar sjálvkravdir hava sett hesa reglu í sáttmálan, sigur at teir hava ikki vera smáligir.

## Umstøðurnar, áðrenn FF var stovnað

Teir, sum fyrst og fremst løgdu lunnar undir FF, vóru Símun Pauli úr Kunoy og Rasmus Rasmussen. Teir fingu í lag blaðútgávu, og felagið gav í 8 ár út vikublaðið FF-blað føroyska fiskimanna. Hetta var ikki lítið avrik, tá hugsað verður um prentmøguleikarnar tá. Hetta blað verður viðurkent fyri at hava havt stóran týdning fyri fiskimannafelagið, men kortini gavst felagið við hesi útgávu, tí tað eydnaðist at skapa illvild millum fiskimenn móti blaðnum.

Í 1920 greiðir Símun P. úr Kunoy frá gongdini og umstøðunum, tá ið felagið varð sett á stovn. Undir yvirskriftini: "Kan den færøske Fisker undvære at være organiseret?" verður sagt:

"Den, som i Begyndelsen af Aarhundredet lagde Mærke til, hvorledes den færøske Skibsfisker var stillet med Hensyn til Kontraktafslutning overfor sin Reder, maatte uvilkaarlig spørge sig selv: Kan man med god Samvittighed lade den Slags passere uden at gøre Forsøg paa at faa det ændret? En Flok Mennesker kommer tilfældigt sammen paa et Kontor og en Sysselmand eller Kontorist oplæser noget for disse mennesker i et fremmed Sprog, og bagefter har de saa Vilkaaret: enten at skrive under eller at lade være med at tage paa Fiskeri. Hvad kunde disse Mennesker i en saadan Situation gøre for at ændre en Tøddel i Kontrakten, den Kontrakt, som bandt dem for et Aar til et farefuldt og besværligt Arbejde, men som kun gav dem et usselt Udbytte. Det hjalp ikke stort, om de vekslede Ord med Kontormanden, som maaske ikke den Gang fandt det formaalstjenligt at fraternisere med Fiskerne. Og hvordan var saa Kontrakten? Paa saa godt som alle Punkter var den saadan lavet, at Fiskernes saakaldte Tredjedel havde Fradrag her og Fradrag der. Snart skulde der betales for Sild, Iskasse, Bøsser, Ammunition o.s.v. foruden alt muligt andet ved Salg af Fangst.

## Mistonktu tann mest erliga reiðaran

Følgen af den hele Ordning var, at der bredte sig en grænseløs Mistænksomhed mellem Fiskerne, saa de mistænkte den mest reelle Reder, en kan tænke sig, som den, der godt kan lade fem være lige. Fiskeren stod faktisk hjælpeløs. Han kunde ikke med Sikkerhed sige, om han blev snydt eller ikke; han vidste kun en Ting, at hvor meget han sled og slæbte, rig blev han ikke. Og det allerværste af det hele var, at man kunde mærke, at det bar derhen, at enkelte søgte at være Venner med Arbejdsgiveren for at opnaa noget for sig, saa at det saa ud til, at den før saa ranke færøske Fisker begyndte at blive lidt duknakket.

Under disse lidet lystelige Forhold var det, at Føroya